# 91 ára gamal vil ha



– Eg havi einki serligt gjørt fyri at gerast so gamalur. Sum ungur roykti eg nógv, og eg havi etið alt, sum kom á borðið, sigur Axel Olsen
Mynd: Vilmund Jacobsen

**– Tað er ov langt og tungt at ganga yvir á trøðna við Toftavatn; tí hevði tað verið gott, um eg hevði ein bil. Tað er eisini so keðiligt at sita einsamallur við hús. Tú upplivir einki, um tú ikki hevur bil og kanst koyra, har tú vilt. Eg sakni túrarnar út á Nes og eftir Agninum, sigur 91 ára gamli, Axel Olsen, sum slett ikki hevði stúrt fyri at sett seg í ein bil aftur**

SAMRØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hann var bert níggju ára gamal, tá ið hann fór fyrsta túrin til skips við deyðsiglaranum, Mistletoe. Pápin, Guttormur Olsen, Uppi á Regni á Toftum, var skipari. Kona Guttorms, Elisabeth, sum var ættað Heima úr Túni á Toftum, var vorðin sjúk, og Guttormur visti sær eingi onnur ráð enn at taka sonin við sær til skips. Hjúnini, Guttormur og Elisabeth, áttu seks børn.

Men tað var lættari sagt enn gjørt at taka 9 ára gamla sonin við sær yvir á Eysturlandið.

– Eg og pápi byrjaðu hjá fysikus, lækna, men endaðu á fundi saman við læknanum, amtmanni og gomlu lærarinnuni. Nógv varð kjakast á hesum fundi. Lærarinnan helt upp á, at eg var alt ov ungur at fara til Íslands, men hon »tapti«. Læknin skar ígjøgnum og helt ikki, at eg fór at fáa skaða av hesum. Endin var, at eg sum níggju ára gamal fekk loyvi at fara til skips saman við pápa mínum. Eg haldi ikki, at eg fekk mein av hesum, men lærdi nógv, sum kom mær til góðar seinni í lívinum. Hóast sjúkuna, livdi mamma mín, til eg var komin til mans.

Níggju ára gamli drongurin, vit tosa um, er Axel Olsen á Toftum, sum í dag er 91 ára gamalur og fyllir 92 til heystar.

– Sum níggju ára gamalur, hevði eg verið nógv á báti. Mær dámdi ómetaliga væl at flóta, og altíð var eg saman við pápa mínum, tá ið høvið beyðst, sigur Axel og heldur fyri, at hann kendi einki til sjóverk á túrinum við Mistletoe undir Íslandi.

Guttormur Olsen var skipari, og haraftrat var hann av raskastu og mest avhildnu útróðrarmonnum.

## Saknar bilin

Hóast høga aldurin, er Axel væl fyri. Hann er byrgur og hevur koyrt bil heilt fram til heystar, tá ið heilsan fór at bila. Tá gav hann abbasoninum bilin. Men Axel gav ikki bilin, tí hann ikki kundi koyra. Hann hevur framvegis koyrikortið, og nú heilsan er betur aftur, tosar hann um at keypa sær nýggjan bil!

Eitt skifti í heyst og í vetur hevur Axel verið nakað plágaður av vatni, sum setti út í kroppin.

Men nú hann er væl fyri aftur, saknar hann at kunna koyra yvir á Mýrarnar og oman á Sandin Mikla við Toftavatn, har hann hevur trøð, sum sonurin, Gunnar, nú tekur sær av.

– Tað er ov langt og tungt at ganga niðan á her og yvir á trøðna; tí hevði tað verið gott, um eg hevði ein bil. Tað er eisini so keðiligt at sita einsamallur við hús. Tú upplivir einki, um tú ikki hevur bil og kanst koyra, har tú vilt. Eg sakni túrarnar út á Nes og eftir Agninum, har sýnið er gott yvir á fjørðin, yvir Toftavatn og yvir Æðuvík og Rytuvík, tá ið tú kemur longur eystur. Jú, hetta sakni eg ógvuliga nógv.

Spurdur, um hann ikki kundi hugsað sær ein brúktan bil, nú árini kortini eru so mong, sigur Axel:

– Nei, tað veit eg ikki. Eg eri ikki meira enn nøkur og hálvfems, og tí hevði eg einki havt ímóti at havt ein nýggjan bil, sigur hann og smílist.

Men meinar Axel nú veruliga, at hann ynskir sær ein bil aftur at koyra í, spyrja vit.

– Jú, sjálvandi! Tað er so vist, at eg geri tað, sigur hann avgjørdur – og nú smílist hann ikki, tí tað skilst á øllum brøgdum, at hann meinar tað í álvara.

– Nei, nei. Eg hevði slett ikki stúrt fyri at sett meg í ein bil aftur, sigur Axel og vísir á, at tað hevur ongantíð verið nakar trupulleiki hjá honum at fingið neyðugu sýnsroyndina, tá ið hann hevur endurnýggjað sær koyrikortið.

Hann sigur, at eyguni eru, sum tey altíð hava verið - og tey eru góð, leggur hann aftrat.

Í koyrikortinum hjá Axeli stendur, at tað - í hesum umfari - er galdandi til miðskeiðis í summar, men hann hevur ongan hug at lata tað gleppa sær av hondum.

– Eg havi altíð endurnýggjað mær koyrikortið í góðari tíð, og gongst sum ætlað, vænti eg, at soleiðis verður eisini í summar, sigur 91 ára gamli toftamaðurin.

## Fútin var við

Josefina, dóttir Axel, sum nú er komin inn á gólvið, sigur, at hon og pápin tóku koyrikortið samstundis. Hon tekur koyrikortið fram og hyggur at tí.

- Hetta var 3. juli í 1958. So, pápi hevur verið 44 ára gamalur tá.

Hon sigur, at tey vóru trý, sum tóku koyrikortið samstundis, og sjálvur fútin skuldi vera við!

– Hví hann skuldi vera við til hesa uppgávu, veit eg ikki, sigur Josefina, sum í fleiri ár var skúlastjóri á Toftum og er mamma ein so vælkendan føroying sum Meinhard Jacobsen, stjóra á Føroya Fiskavirking!

Sostatt er Axel, sum vit umrøða í hesi greinini, eisini abbi umrødda fiskavirkisstjóran.

– Jú, Meinhard var inni á gólvinum hjá mær í gjárkvøldi, sigur Axel, meðan vit sita við køksborðið og práta.

Tá ið tú ert farin um tey níti, hevur tú livað eitt langt